gult cyan magenta svart



## Ford Thunderbird



Í USA er Ford farin at framleiða konseptbilin Ford Thunderbird, sum er gjørdur við Thunderbird frá 50´unum sum fyrimynd. Meira enn 23.000 keyparar hava víst áhuga á heimasíðuni hjá Ford, og bilurin vekjur stóran áhuga hjá teimum sum vóru ung í 50´og 60´unum.

*Kelda: Bilen Motor & Sport*

## Gott ár hjá GM



Samlaði ársroknskapurin hjá General Motors fyri ár 2000, vísti ein metumsetning uppá 1.453.570 mia. krónur, og eitt yvirskot uppá 40 mia. krónur

*Kelda: Motor Magasinet*



## Jeep Liberty

Jeep er komin á marknaðin við einum nýggjum Liberty, sum er ein ektaður “off-roadari”, har stórur dentur er lagdur á at bilurin skal vera praktiskur at brúka. Uttanfyri USA verður bilurin marknaðarførdur sum Jeep Cherokee.

*Kelda: Bilen Motor & Sport*

ÚT AT KOYRA

# Campingvognar – ov dýrir í Føroyum




*Campingvognar hjá føroyingum eru skrásettir uttanlands vegna ov stórt innflutningsgjald*

**Ein fyribils arbeiðsbólkur við Jákup S. Joensen og Heini á Borg, hevur sent eitt skriv til Fíggjarmálastýrið, har teir vísa á, at um innflutningsgjaldið uppá uppá campingvognar, ið er 45 prosent av avgjaldsskylduga virðinum bleiv tikið av, hevði tað havt við sær at fleiri høvdu ogna sær campingvognar við føroyskum nummarplátum, og lanskassin hevði fingið fleiri inntøkur í MVG**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

### Bert campingvognar

Í løgtingslóg nr. 175 frá 18. desember 1992 um skrásetingargjald á motorakførum v.m., verður ásett stødd á avgjaldum fyri ymisk sløg av akførum. Sambært §12 í somu lóg, er avgjaldið fyri campingvognar 45 prosent av avgjaldsskylduga virðinum, meðan tað sambært §13 og 14, einki avgjald er á øðrum viðfestisvognum.

### Skrásettir uttanlands

Arbeiðsbólkurin vísir á at fyri tey sum dáma campinglívið, og hendan hátt at ferðast uppá, er avleiðingin tann at føroyingar sum eiga campingvogn, mugu hava teir standandi uttanlanda, av tí at avgjaldið er so stórt. Hetta hevur so eisini við sær at teir ikki hava møguleika at uppliva sítt egna land við campingvogni. Í Danmark verður onki avgjald kravt fyri kampingvognar, bert meirvirðisgjald, og arbeiðsbólkurin vísur á at sami kampingvognur sum í Danmark kostar 125.000 kr., kostar 195.000 kr. í Føroyum. Tað vil siga, 70.750 kr. meira enn í Danmark.

### Fleiri campingpláss

Eisini vísa teir á at av tí at føroysk campingpláss ikki eru skrásett í ferðahandbókum uttanlanda, hevur tað við sær at Føroyar ikki koma upá tal, tá summarfrítíðin verður løgd til rættis. Tískil koma alt ov fá ferðandi við campingvogni ella campingbili til Føroya at ferðast. Tey sum koma higar, eru ávegis til Íslands ella Noregs, og steðga bert á her millum túrarnar hjá “Norrønu”. Campingplássið Yviri við Strond, er tað einasta sum kann lúka minstu krøvini, fyri at verða skrásett, og uttanfyri Havnina er onki campingpláss at bjóða teimum ferðandi.

### Stovna felag

Niðurstøðan hjá arbeiðsbólkinum, er at vit í Føroyum eru týðuliga afturúrsigld innan hesa frítíðargrein, og eingin endurnýgging av campingvognum er farin fram tey seinastu 10-15 árini. Við at strika avgjaldið, hevði Landskassin fingið meira inntøkur í MVG, og tey sum høvdu gamlar og nærum óbrúkiligar campingvognar, kundu skift teir út. Eisini høvdu eigarnir av teimum mongu campingvognunum sum standa uttanlands, uttan iva flutt teir heim, ella ogna sær nýggjar kampingvognar við føroyskum nummarplátum. Tey sum eiga kampingvognar hava ætlanir um at stovna eitt felag, sum eitt nú kundi arbeitt fyri at fingið nýtilig campingpláss ymsa staðni í Føroyum. Treytin er tó at innflutningsgjaldið verður tikið av, siga Jákup S.Joensen og Heini á Borg.




*Heini á Borg og Jákup S.Joensen hava tikið stig til at bøta um umstøðurnar hjá teimum sum ynskja sær ein campingvogn við føroyskum nummarplátum*

gult cyan magenta svart

ítróttur

Nr. 42 • hósdagur • 1. mars 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Stórkapping í fimleiki



*Sunnudagin verður stórkapping hildin í Runavík, har fimleikarar úr fýra feløgum fara at vísa kynstur síni*

**Sunnudagin verður árliga stórkappingin í fimleiki hildin í Runavík**

FIMLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Sunnudagin, 4. mars, verður tann árliga stórkappingin í rútminskum fimlieki í ítróttahøllini í Runavík. Til saman 18 lið úr fýra fimleikafeløgum luttaka. Kappast verður í fýra aldursbólkum: pinkur, smágentur, gentur og kvinnur, og eru fimleikafeløgini, ið taka lut Havnar Fimleikafelag, Fimleikafelagið Ljósið, Støkk og Fok. Har umframt fara eisini gestalið at taka lut.

Hjá pinkum eru fýra lið og hjá smágentum trý, sum skulu kappast móti hvørjum øðrum. Í kappingini hjá gentum og kvinnum luttaka bert Havnar Fimleikafelag og Ljósið. Pinkur kappast bert í einari seriu, meðan hinar skulu gera bæði eina fría seriu og eina við amboðum. Í ár hava smágenturnar ringar sum amboð, genturnar hava vimplar, meðan kvinnurnar hava hoppibond.

Tann føroyska stórkappingin fer fram eftir somu reglum, sum eru galdandi í donsku Grand Prix kappingunum, men tó eru nakrar serstakar viðtøkur, sum bert eru galdandi í Føroyum.

Til stórkappingina eru fýra dómarar, sum geva sína metan, umframt tveir høvuðsdómarar. Í stuttum kann sigast, at dømt verður bæði tøkniligt, har serligur dentur verður lagdur á torleikastøðið, umframt at mett verður eisini um listarligu framførsluna, har tað í mestan mun verður hugt at koreografiini.

Byrjað verður klokkan 14.00, og kappingarnar verða í hesi raðfylgju: Pinkur, smágentur – frí íðkan, smágentur – amboð, gentur – frí íðkan, gentur – amboð, kvinnur – frí íðkan og kvinnur – amboð.

Kappingarnar hjá pinkum og smágentum verða avgreiddar við heiðursmerkjahandan, áðrenn genturnar koma inn á gólvið. Stórkappingin veðrur væntandi liðug umleið kl. 17.00.

## So verður farið ígongd

**Um veðrið annars loyvir tí, verður farið í holt við fótbóltskappingina 2001 um vikuskiftið**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jákup Mørk*

Eftir drúgvan vetrarsteðg verður aftur lagt til brots við fótbóltinum um vikuskiftið.

Kappingin um løgmanssteypið byrjar hetta vikuskiftið, og áðrenn farið verður í holt við sjálvt bólkaspælið, skulu nakrir innleiðandi dystir fáast frá hondini.

Ásett er nú, nær hesir skulu spælast, og framgongur hetta av yvirlitinum niðanfyri.

| | | |
|---|---|---|
| 04.03 | LÍF-AB | Eiler Rasmussen |
| 04.03 | Sumba-Fram | Zoran Mancic |
| 04.03 | ÍF-Skála | Jóannes Mikkelsen |
| 07.03 | TB-Royn | Poul Erik Jacobsen |

Eftir hetta spæla vinnararnir av dystinum TB/Royn móti vinnaranum av Sumba/Fram, meðan LÍF ella AB spæla móti ÍF/Skála. Hesir dystir eru báðir settir á skránna tann 10. mars, og verða tað ávíkavist Niclas á Líðarenda og Oddmar Andreasen, sum skulu døma teir dystirnar.

# Stjørnan má fylgja við

**Hóskvøldið skal Stjørnan royna at halda fast um møguleikan at vinna FM**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Hóast hetta kappingarárið ikki hevur gingið heilt eftir vild hjá klaksvíkingum, so er Stjørnan framvegis besta boð upp á eitt lið, sum framvegis kann fylgja við VÍF.

Í løtuni eru tær á triðja plássi, men tær eiga ein dyst til góðar í mun til VB, men hesin munur er burtur, tá tær í kvøld hava spælt móti neistakvinnum. Tí er eisini tvingandi neyðugt hjá Stjørnuni at vinna dystin, men ivaleyst verður hetta tó ein sera torfør uppgáva.

Tá liðini hittust í grundspælinum, var tað ikki fyrr enn í seinastu sekundunum, at Stjørnan tryggjaði sær sigurin, men umframt hetta, verður dysturin helst eisini mintur fyri eina aðra hending. Hetta var, tá Adriana Milodanovic sleit hælsinuna, og hóast Stjørnan vann dystin, so hava dystirnir síðani hetta prógvað, at talan so avgjørt var um ein sera stóran miss hjá meistaraliðnum.

Adriana er nú so smátt komin fyri seg aftur, men um hon er nóg birg til at fara á vøllin í týdningarmikla dystinum í kvøld, man vera óvist.

*Tað var í dystinum móti Neistanum í grundspælinum, at Adriana Milodanovic fekk álvarsliga skaðan, sum at kalla hevur oyðilagt kappingarárið hjá henni*

